

# SANNFØRANDI FØROYSK AVRIK

## Landsliðsleikararnir Viljormur Davidsen og Sonni Ragnar Nattestad leiktu um vikuskiftið sannførandi fyri síni lið í næstbestu donsku deildini



### Viljormur við tveimum uppleggum

Vinstri bakkurin á føroyska landsliðnum, Viljormur Davidsen, leikti sunnudagin allar 90 minuttirnar, tá Vejle á útivølli spældu 2-2 javnleik móti FC Roskilde.

Og Viljormur Davidsen átti eisini sín stóra leiklut í, at Vejle fekk javnleik, tí Viljormur átti nevniliga næstseinasta fótin á báðum málunum hjá Vejle.

Viljormur Davidsen greiðir á heimasíðuni hjá Vejle frá báðum málunum.

- Til tað fyrsta málið komi eg til baklinjuna, har eg skjóti innlegg. Tað koma tveir leikarar rennandi inn í feltið, og tað endar so við at Hakan Redzep fær skotið bóltin í netið til støðuna 1-1.
- Til tað seinna málið fái eg bóltin í vinstru síðu, nakað frammanfyri miðjuna. Eg síggi at har er pláss aftanfyri verjuna hjá teimum, og tí skjóti eg ein bólt fram til Christian Sivebæk, ið síðani skallar bóltin í netið til endaligu støðuna 2-2.

Viljormur Davidsen greiðir eisini frá á heimasíðuni, at hann er væl nøgdur við at leggja upp til bæði málini.

- Sum verjuleikari er tað altíð deiligt, tá tú kanst vera í álopsspælinum, og tí er tað ein góð kensla at eiga uppleggini til bæði málini hjá okkum. Harafturat gleddist Viljormur Davidsen eisini um, at Vejle megnaði at koma aftur í dystin tvær ferðir, eftir at felagið hevði verið aftanfyri.

### Sannførandi fyrsti dystur hjá Nattestad

Sunnudagin leikti ungi miðvingurin Sonni Ragnar Nattestad sín fyrsta dyst á liðnum hjá AC Horsens, eftir at hann er leigaður til AC Horsens frá FC Midtjylland.

Og byrjanin hjá Sonna Ragnar Nattestad í AC Horsens kundi valla verið betri. Tað eydnaðist AC Horsens fyri fyrstu ferð í kappingarárinum at fáa ein sigur, og harafturat eydnaðist tað at halda nullið. Og Sonni Ragnar Nattestad átti eisini sín stóra leiklut í, at AC Horsens fekk 3 stig og at einki mál kom ígjøgnum.

Heimasíðan hjá AC Horsens skrivar, at talan var um sannførandi debut frá føroyska landsliðsleikaranum.

- Talan var um fyrsta dystin hjá Sonna Ragnar Nattestad fyri teir gulu, og staðfestast má at hann debuteraði í sannførandi stíli.

### Brandur í hópinum og full spælitíð til Kristian

Fríggjakvøldið spældi FC Keypmannahavn heimadyst móti FC Midtjylland.

Við í hópinum hjá FC Keypmannahavn fríggjakvøldið var ungi skálvíkingurin Brandur H. Olsen, ið leikar fyri danska stórfelagið. Hóast Brandur H. Olsen ikki kom á vøllin fríggjakvøldið, og enn eigur sín fyrsta dyst til góðar í bestu donsku deildini, bendir tó nógv á, at ungi føroyski leikarin alsamt nærkast hitanum á besta FCK liðnum.

Føroyski U-21 landsliðsmálverjin Kristian Joensen fekk í seinastu viku eisini debut fyri sítt nýggja felag Lyngby BK.

Kristian Joensen stóð í málinum allar 90 minuttirnar, tá Lyngby í steypakappingini leikti seg víðari, eftir at teir vunnu 2-0 móti Avarta. Talan var um sannførandi avrik frá føroyska málverjanum, tí at tað eydnaðist Lyngby at halda nullið.

Føroyski landsliðsleikarin í Aalborg, Gilli Sørensen, er eisini við at koma fyri seg, eftir ein heldur drúgvari skaðasteðg. Gilli Sørensen leikti í seinastu viku aftur á næstbesta liðnum hjá AaB.

Í næstum verður føroyska landsliðið úttikið til heimadystin móti Finnlandi tann 7 september.